


Mynd: Jens Kristian Vang

AR



*Mercedes-Benz og Lexus til drotningina og Elton John*

*Mynd: Bilrøkt*

teir báðar Mercedes-Benz E320, ein svartan og ein silvurgráan, sum koyra við hennara hátign Margrethu drotning og Heindriki prinsi.

Eisini hava teir gjørt ein svartan Lexus GS 300 kláran fyri Five Star Entertainment, sum skipar fyri Elton John vitjanini í Føroyum. Bilin eigur Martin Restorff í Havn.

**mg**




*Ingi Gunnarsson, stigtakari til minningardagin*

# Minningardagur teirra deyðu í ferðsluni

**Minningardagur teirra deyðu í ferðsluni verður sunnudagin 4. juli. Tað er stigtakarin til minningardagin, Ingi Gunnarsson, við hjálp frá limum í áhugafelagnum Føroya Ellisakførum og øðrum, sum leggja blómur út kring landið**

Minningardagur teirra deyðu í ferðsluni hevur verið hildin á hvørjum ári síðan 2000. tó ikki í fjør, tá ið tiltakið var av ongum, tí stigtakarin til minningardagin, Ingi Gunnarsson, fekk ikki blómurnar lagdar. Ingi fekk ikki nóg nógv fólk at hjálpa sær.

Fyrr í ár sendi Ingi fyrispurning til nevndina í áhugafelagnum Føroya Ellisakførum um hjálp til at leggja blómur út í Streymoynni og Eysturoynni. Ingi sigur, at hann hevur fólk at hjálpa sær í Vágum, einum parti av Streymoynni, Klaksvík, Sandoy og í Suðuroy.

Nevndin í Føroya Ellisakførum tók væl ímóti fyrispurninginum. Eirikur Ó. Simonsen, formaður í felagnum, sigur, at teir gjørdu av at heita á limir sínar um at hjálpa til við at leggja blómur út. Umframt at áheitanin er á heimasíðu felagsins, hava limirnar eisini fingið boð um sms-ketuna, sigur Eirikur, sum vónar, at limirnir taka væl undir við tiltakinum.

Tey, ið kunnu rætta ein hjálpandi hond, eru vælkomin at seta seg í samband við Inga Gunnarsson á telefon. 794652.

**mg**

# Royndarkoyring og ferðafrásøgn

Í farnu viku koyrdi ein spildinýggjur Skoda Yeti 4x4 í Føroyum við hollendskum nummarplátum og AutoWeek skeltum á síðuni.

Talan var eitt ferðalag upp á fýra fólk, sum skulu royndarkoyra bilin fyri bilmagasinið AutoWeek, samstundis sum ein ferðafrásøgn verður gjørd um Føroyar og Ísland. AutoWeek er størsta bilmagasin í Hollandi. Tann sum tekur myndirnar og skrivar frásøgnina er Tamara Laskowski, sum er grafiskur designari og fotografur.

Skoda Yeti 4x4 er ein fimmpersónabilur sum kom á marknaðin í 2009. Skoda hevur sponsorerað túrin, og er tað ein góð reklama fyri teir við eini ferðafrásøgn úr Føroyum og Íslandi við einum fýrahjólsdrivnum Skoda.

**mg**



*Tamara Laskowski, grafiskur designari og fotografur, við føroyskum bilblað*



*Skoda Yeti 4x4 skal royndarkoyrast í Føroyum og Íslandi*

*Myndir: Magnus Gunnarsson*